

**NISSAN PATROL 2.8 TD** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TN 397 **Km:** 147.000
**Árgangur:** 11.11.1998
**Útgjald:** 32.500 **Mðr. gjald:** 3.200 (3 ár)

**kr. 130.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MN 261 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 01.06.2007
**Útgjald:** 46.300 **Mðr. gjald:** 3.000 (5 ár)

**kr. 185.000,-**



**FORD FOCUS GHIA 1.6 BENSIN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VP 011 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 30.12.2004
**Útgjald:** 32.000 **Mðr. gjald:** 2.100 (5 ár)

**kr. 128.000,-**



**PEUGEOT 1007** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UH 547 **Km:** 29.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 1.750 (5 ár)

**kr. 108.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 52.000 **Mðr. gjald:** 3.310 (5 ár)

**kr. 208.000,-**




**MITSUBISHI PAJERO SPORT** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MG 794 **Km:** 42.000
**Árgangur:** 17.02.2006
**Útgjald:** 42.000 **Mðr. gjald:** 2.650 (5 ár)

**kr. 168.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BS 075 **Km:** 7.000
**Árgangur:** 21.05.2007
**Útgjald:** 46.000 **Mðr. gjald:** 2.900 (5 ár)

**kr. 184.000,-**



**COROLLA 1.6 5D H/B AUT.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 264 **Km:** 117.878
**Árgangur:** 10.06.2002
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 2.701 (3 ár)

**kr. 108.000,-**



**HONDA CIVIC 1.6 SEDAN** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MB 923 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 08.05.2003
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.090 (3 ár)

**kr. 85.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D TERRA DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.840 (3 ár)

**kr. 158.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Listasavnið í støðugari menning



*Listasavnið hevur gjørt serliga nógv við kunning til børn. Her er tað Oggi Lamhauge, listamiðlari, ið greiðir frá skurðmynd hjá Janusi Kamban*

**Skráseting av verkum, gransking og kunning um føroyska list eru tættir í støðugu menningini av Listasavninum, sum er stungin út í kortið farna fýraáraskeiðið**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast byrjanin var nakað baldrut, er farna stýrið fyri Listasavnið sum heild væl nøgd við gongdina á savninum seinstu fýra árini og tey tiltøk, sum eru stungin út í kortið

Í skrivi greiðir stýrið frá, at tað tók við í 2005 var neyðugt við skjótum avgerðum fyri at tryggja stovninum framhaldandi virkismøguleikar.

## Savnað og skrásett

Hesi seinastu árini eru nýggj verk javnan keypt, eins og nøkur eldri verk komin í savnið.

Kortini røkkur játtanin ikki til at tryggja savninum tey mest týðandi verkini, tá hesi eru tøk.

Arbeitt hevur verið við at fáa eina skipan í lag til hetta, óhefta av vanligu rakstrarjáttanini.

Hetta kann hava stóran týdning, um savnið skal menna seg til sum tjóðarsavn, har tað besta er til skjals. Eisini hevur savnið hevur sett í verk tilgongdina til at varðveita listaverkini hjá Føroya Banka sum almenna ogn í sambandi við einskiljingina.

Hartil er ein fullfíggja teldutøk skráseting av øllum verkum hjá savninum er gjørd. Verkini er skrásett, merkt, avmyndað, og staðfest er, hvar tey eru at finna. Hetta hevur vantað, og er ein sjálvsagdur táttur í savnsarbeiðinum.

Hetta skeiðið eru fleiri av høvuðsverkunum er umvæld av fólki við neyðugum førleika. Sum dømi kann nevnast, at flestu málningar eftir Mikines eru konserveraðir hesi seinastu árini. Eisini eru øll verk tryggjað sambært skrásetingini eftir virðismeting av hvørjum einstøkum verki.

## Framsýning

Í Listaskálanum er fasta framsýningin, ið er umskipað nakrar ferðir. Harumframt eru skiftandi framsýningar við føroyskum og útlendskum listaverkum.

Miðað verður ímóti fjølbroytni við at framsýna nýggj og eldri verk, fleiri listafólk saman og einsæris, føroysk og útlendsk, eldri og yngri. Tað gleðiliga er hent, at eitt ungt og spennandi ættarlið hevur verið umboðað á fleiri framsýningum.

## Kunning og gransking

Savnið hevur verið virkið við umfatandi bókaútgáva, rundvísingum og fyrilestrum. Serligur dentur hevur verið lagdur á kunning til børn í skúlaaldri og yngri. Fólk eru sett at taka sær av hesum, og tað fyrsta skrivliga tilfarið komið.

Málið er at fáa skipaða gransking í lag, við savninum sum natúrligum miðdepli. Arbeitt hevur verið við hesum, og vónandi er hetta eitt øki, ið tað fæst meira rúmd til. Skráseting og útgáva, sum verður framd av savninum, eru skorður undir hesi gransking.

## Fígging og umstøður

Nógv orka fer við at tryggja stovninum best møguligar fíggjarkarmar. Eftir umstøðunum hevur hetta gingið rættiliga væl í hond, tí tað frá nógvum ymiskum síðum er áhugi fyri virkseminum á savninum. Men fleiri uppgávur kundu verið loystar betri, um meira rúmsátt var fíggjarliga, ásannar farna stýrið.

Á savninum er plásstrot, tá talan er um framsýning t.d. størri framsýningar og serlig listaverk, hvussu grafikkur kann framsýnast uttan at taka skaða, tørvur er á goymslum, plássi til upp- og niðurpakking, frálæru, gransking og rúm til ymisk onnur endamál. Tørvur er á at vissa forsvarligt inniklima, og at trygdin er nøktandi.

Savnið er farið undir eina verkætlan at fáa útbygt. Byggimøguleikar eru lýstir, og á hesum grundarlagi eru samráðinar tiknar upp við Tórshavnar Kommunu og Skógfriðingarnevndina um, hvussu ein útbygging kann skipast.

Manningin á savninum er lutfalsliga lítil, eisini samanborið við søvn av líknandi stødd aðrastaðni. Tí hevur tað havt týdning, at starvsfólkið hevur neyðugar fjølbroyttar førleikar, serliga innan fyrisiting, listfrøði og t.d. miðlan.

Í farna fýraáraskeiði var stýrið fyri Listasavnið mannað við hesum limum:

Jógvan Páll Lassen, formaður, tilnevndur av Mentamálaráðnum, Hildur Eyðunsdóttir, tilnevnd av Tórshavnar Kommunu, Sigrun Gunnarsdóttir, tilnevnd av Føroysk Myndlistafólk, Árni Winther, tilnevndur av Listafelagi Føroya

Tann 1. apríl 2009 tók nýtt stýri við sambært viðtøkum fyri Listasavnið.